# BÓNDI Í HERNAÐ ÍMÓTI EINUM AV HEIMSINS STØRSTU GULLNÁMUM

# PERU

## MÁXIMA ACUÑA




**Hesin bóndin har norðuri í Peru er farin í hernað ímóti einum av heimsins størstu gull- og koparnámum.**

Máxima Acuña hevur drigið Yanacocha, eitt av heimsins størstu gull- og koparnámum, í rættin. Rættarósemjan snýr seg um ognarrættin til jørðina, har hon og familjan búgva. Hon hevur staðið ímóti harðligum álopum frá politinum á staðnum fyri at nokta at flyta. Máxima sigur ágangin vera eina roynd at reka seg burtur, so at námsfyritøkan sleppur at brúka jørðina. Men hon noktar at geva eftir fyri trýstinum.

Politiið hevur fleiri ferðir lagt hond á familjuna, seinast tann 18. septembur, tá ið Máxima endaði á sjúkrahúsi. Tey hava sligið hana og børnini, oyðilagt henni húsini og rivið ein útbygning, sum stóð í gerð, niður. Einferð oyðiløgdu vápnaðir trygdarvørðir hjá Yanacocha eisini grøðina hjá henni.

Ræðsluátakið hevur til endamáls at trýsta hana at geva eftir og flyta, men Máxima fer ongan veg. ”Eg fari ongantíð at boyggja meg fyri Yanacocha,” sigur hon.

Hennara dirvi hevur vunnið henni Goldman-virðislønina fyri 2016. Hetta er hægst virda umhvørvisvirðisløn í heiminum.

**Fólk í økinum hava stóra virðing fyri Máximu Acuña sum einum leiðara, sum verjir jørðina. Tey hava tikið lógvatak saman fyri at verja hana, og tað eiga vit eisini at gera. Heit á Peru um at verja hana fyri harðskapi og hóttanum.**

# ÁHEITANARBRØV

**Skriva innlendismálaráðharranum eini boð.**

**Byrja við: "Dear Minister,"**

- Sig, hvør tú ert, og hví tú stúrir fyri trygdini hjá Máximu Acuña.
- Bið hann við tínum egnu orðum verja Máximu fyri ágangi og hóttanum, sum hon livir undir hvønn dag.

Dear Counsellor.

I am writing to express my concern about the ongoing detention of photojournalist Mahmoud Abu Zeid, or Shawkan, following his arrest in August 13, 2013 in Cairo.

I believe the charges against Shawkan are unjustified. Taking pictures is not a crime.

I ask you to ensure that all charges against Shawkan are dropped and that he is released without delay.

Sincerely,

## Send boðini higar:

Carlos Basombrío

Ministerio del Interior

Plaza 30 de Agosto s/n Urb. Corpac

San Isidro

Lima, Perú

# SAMHUGABRØV

**Vís Máximu, at tú stendur undir liðini á henni.**

Fortel henni, at tú talar at fyri at verja hana og familjuna.

Máxima Acuña
c/ o Amnistía Internactional Perú
Calle Manuel A. Fuentes 894
San Isidro
Lima
Perú



## ÁHEITANARBRØV

**Endamálið** við einum áheitanarbrævi er at fáa móttakaran at fremja eina gerð, ið ger at rættindini hjá einum øðrum menniskja verða hildin. Ofta verða áheitanarbrøv send til myndugleikapersónar sum t.d. kongalig, forsetar, forsætisráðharrar ella borgmeistarar, tí hesir persónar hava skyldu til at taka sær av teimum brotum, sum henda.

**Orðaval -** í einum áheitanarbrævi hevur stóran týdning fyri um móttakarin tekur brævið í álvara. Tað er umráðandi at vera fólkaligur, óansæð hvat móttakarin hevur gjørt, ella kanska ikki hevur gjørt.

**Dagfesting -** fyri nær brævið hjá tær er skrivað. Dagfestingin verður skrivað ovast til høgru.

**Heilsan til móttakaran.** Brúka bara heitið á móttakaranum, t.d. Tygara kongaliga hátign, Frú forseti ella Hr. borgmeistari.

**Inngangur -** Stutt frágreiðing um endamálið við brævinum.

**Áheitan -** Kann eisini nevnast høvuðsteksturin í brævinum. Her verður greitt frá trupulleikanum og grundgevingunum fyri at móttakarin eigur at hjálpa við at loysa teir.

**Endi -** Tað er eitt gott hugskot at enda brævið fólkaliga, t.d. Vinarligar Heilsanir.

**Fulla navnið hjá tær.**

## SAMHUGABRØV

**Endamálið** við einum samhugabrævi er at geva móttakaranum eina vón og eina trúgv uppá at hansara ella hennara stríð fyri rættvísi fer at eydnast. Brævið vísir móttakaranum at hann ella hon ikki eru gloymd og ikki stríðast einsamøll, men at umheimurin gevur sær far um tey brot, ið ganga fyri seg og stríðist fyri at mannarættindini hjá móttakaranum verða hildin.

**Innihaldið -** Tað eru nógvir møguleikar fyri hvat tú kanst skriva í einum samhugabrævi, og hvussu tú kanst skriva tað. Tú kanst skriva stutt ella langt. Tekna eina mynd ella skriva eina yrking. Tað er púra upp til sendaran at royna at meta um, hvat hann heldur at móttakarin hevur brúk fyri at hoyra. Tann, ið fær eitt samhugabræv er ofta tann persónurin, sum er fyri brotum á mannarættindini.

Brævið kann eisini sendast til avvarandi hjá persóninum, sum er fyri brotum. Tað vil siga familju, vinir og líknandi. Í nøkrum førum er tað ikki gjørligt at senda samhugabrøv beinleiðis persónin, sum er fyri brotum, tí myndugleikarnir, ið standa fyri brotunum forða fyri tí.

**Dagfesting -** fyri nær brævið hjá tær er skrivað. Dagfestingin verður skrivað ovast til høgru.

**Heilsan til móttakaran.**

**Innihald -** Hygg at frágreiðingini omanfyri.

**Endi -** Tað er eitt gott hugskot at enda brævið fólkaliga, t.d. Vinarligar Heilsanir ella Kærar heilsanir.

**Fulla navnið hjá tær.**